## TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen



**MYND:** BIRGIR W. HØGNESEN

*– At arbeiða í fiski er líka sum nakað, ið skal roynast. Eg visti, at hetta bara var fyri eina tíð, og mær dámdi sera væl, sigur Anna Sofía Zachariasen, sum nú er í læru hjá H-Dygd í Vatnsoyrum*

# Anna Sofía lærir og selir vindeygu

MAMMAN ER ÚR **MYKINESI**, OG PÁPIN HEVUR EISINI **ÆTTARBOND** HAR. TVEY AV HENNARA **ELDRU** SYSTKJUM **UPPLIVDU** AT GANGA Í **BARNASKÚLA** Í MYKINESI. **SJÁLV** ER HON VAKSIN UPP Í **SØRVÁGI**. NÚ ER HON Í **LÆRU** HJÁ **H-DYGD** Í VATNSOYRUM, MEN HEVUR ÁÐUR BÆÐI **ARBEITT** HJÁ EFFO, Í FISKI OG HEVUR **VASKAÐ** FLOGFØR

Hóast Anna Sofía Zachariasen bert er 23 ára gomul, hevur hon roynt eitt sindur av hvørjum. Sum 14 ára gomul byrjaði hon at hjálpa til í Effo í Sørvági, har hon upp ígjøgnum árini eigur nógvar arbeiðstímar tilsamans. Hon hevur arbeitt í saltfiski í eitt ár, og hon hevur arbeitt á deildini hjá Atlantic Airways, sum heldur skrivstovunum og flogførini rein.

Á sumri í 2008 tók hon hægri handilsskúlaprógv á Føroya Handilsskúla í Marknagili í Havn, har hon fyrst tók FHS-prógv og soleiðis gekk í trý ár tilsamans.

– Eg droymdi um at sleppa í skrivstovulæru, og tá H-Dygd í Vatnsoyrum lýsti eftir lærlingi fyrr í ár, søkti eg og fekk læruplássið. Læran fevnir um skrivstovu og fyrisiting. Áðrenn eg byrjaði at læra hin 1. mai í ár, visti eg ikki rættiliga, hvat tað var, eg fór í holt við. Sjálvandi var eg ógvuliga spent, men nú ein tíð er fráliðin, eri eg sannførd um, at eg havi valt hitt rætta læruplássið. Mær dámar serstakliga væl hjá H-Dygd, og mær dámar sera væl tað, eg fáist við og tær avbjóðingar, sum eru knýttar at hesum, sigur hon.

### Selir H-vindeygu

Anna Sofía Zachariasen sigur, at nógv er at seta seg inni í, og enn er hon ikki komin runt í fyritøkuni, sum hon tekur til.

Á skrivstovuni hjá H-Dygd sita fýra kvinnur sum selja, umframt ein sølumaður, bókhaldari og stjórin, Jóhan á Mýrini.

Í fyritøkuni tilsamans starvast 35 fólk.

Anna Sofía Zachariasen sigur, at við í læruni er eisini søla, og ein fittur partur av hennara arbeiði er at tosa við viðskiftafólk og geva tilboð upp á vindeygu.

– Nú eg havi verið her í eina tíð, kann eg skriva tilboðini sjálv, men er talan um størri bíleggingar, ráðføri eg meg gjarna við onkran av teimum, sum hava verið longri í fyritøkuni enn eg.

Virksemið hjá H-Dygd er trævindeygu, træ/alu, plastvindeygu og hurðar.

– Træ- og træ/aluframleiðslan er í Vatnsoyrum, meðan framleiðslan av plastvindeygum fer fram í Miðvági, sigur fryntliga sørvágsgentan.

### Fiskur og flogfør

Eftir at Anna Sofía var liðug við hægri handilsskúla í 2008 og heilt fram til, hon fór í læru hjá H-Dygd tíðliga í summar, var hon í starvi hjá Atlantic Airways á deildini, tey rópa »Cleaning«.

– Vit vóru tríggjar kvinnur á hvørji vakt, dagvakt og kvøldvakt, og eisini arbeiddu vit annað hvørt vikuskifti. Uppgávan hjá okkum var at halda skrivstovurnar og flogførini rein. Mær dámdi væl hetta arbeiði. Arbeiðstíðirnar vóru skiftandi, og tað dámdi mær eisini væl, leggur hon aftrat.

Millum framhaldsskúlan og FHS arbeiddi hon í fiski í Sørvági í eitt ár.

– Hetta var á saltfiskavirkinum hjá Jóhan Páll Joensen og øðrum. Her var eg í føstum starvi í eitt ár, og mær dámdi hetta ógvuliga væl. Hetta var ordiliga deiligt, um man kann siga tað so. At arbeiða í fiski er líka sum nakað, ið skal roynast. Eg visti, at hetta bara var fyri eina tíð, og tað var serstakliga áhugavert eisini at arbeiða saman við tilkomnum fólki, ið hava eitt longri lív aftan fyri seg, enn vit ungu. Vit høvdu rímiliga støðugt arbeiði. Tú fekk løn hvørja viku – og um vikuskifti høvdu vit frí, sigur hon.

Anna Sofía Zachariasen er næst yngst í einum systkinaflokki upp á fýra.

– Eg upplivdi ikki at ganga í skúla í Mykinesi, men sum børn vóru vit nógv har úti í frítíðini – og framvegis eigi eg ommu og abba í Mykinesi, sigur unga sørvágsgentan.

## FAKTA

**Navn:** Anna Sofia Zachariasen
**Starv:** Skrivstovulærlingur
**Besta við starvinum:** Lærurík, spennandi og avbjóðandi
**Ringasta við starvinum:** Tað havi eg ikki hugsað um ...
**Starvstíð:** Mai 2010
**Starvsfólk:** 35
**Staður:** Vatnsoyrar
**Stjóri:** Jóhan á Mýrini